AVRIT

LØGTINGIÐ

Landsgrannskoðanin
J. Paturssonargøta 9
Postboks 376
FO-110 Tórshavn

Landsstýrismálanevndin

**22. mai 2008**
**j. nr. 7.13-20060029 ks/td**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi Føroyagrunninum**
Løgmaður hevur við skrivi til landsgrannskoðanina, dagfest 6. november 2007, boðað frá, at hann metir, at rætti myndugleikin at taka hetta málið upp er Landsstýrismálanevndin. Løgmaður hevur sent Landsstýrismálanevndini avrit av hesum skrivi.

Á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 14. mai 2008 gjørdi nevndin av at taka málið upp til viðgerðar fyri at kanna heimildirnar at umskipa Føroyagrunnin frá 1971 til ein sjálvsognargrunn.

Áðrenn nevndin fer undir at viðgera málið, vil nevndin tó tryggja sær, at viðgerðin hjá løgtingsgrannskoðarunum og landsgrannskoðanini av málinum er endað. Er hendan viðgerðin ikki endað, tekur Landsstýrismálanevndin ikki málið upp til viðgerðar, men biður um at fáa kunning um niðurstøðurnar hjá løgtingsgrannskoðarunum og landsgrannskoðanini í málinum so skjótt, hesar fyriliggja.

N.v

Heidi Petersen
nevndarformaður